VI‹MERKINGAR

Solei›is hugsa›u menn tá

Jóannes Eidesgaard

Í kjalarvørrninum av kjakinum eftir seinastu samrá›ingarnar millum Føroyar og Danmark er ivi sáddur um, um vit føroyingar eru ein tjó› (nation) ella kanska okkurt heilt anna›.

Ein ítøkilig fortreyt fyri tjó›arhugtakinum er sambært Hvítubók á sí›u 102, hvussu vit føroyingar sjálvir uppfata okkum. Og ta› er neyvan nakar ivi um, at vit føroyingar kenna okkum og altí› hava kent okkum sum eina tjó›. Og henda kensla kann ikki t‡nast av, at ein miseydna› samrá›ing hevur veri› millum landsst‡ri› og stjórnina.

Vit skylda okkara forfedrum, at vit halda fast um, at vit eru ein tjó›. Spurningurin, hvussu vit sjálvir uppfata okkum hongur neyvt saman vi›, hvussu vit ynskja, at a›rir skulu uppfata okkum. Ta› krevur egnan stoltleika og ikki undirbrotligheit.

Eg havi kaga› í Folketingstidende fyri at síggja, hvussu teir gomlu politikkararnir hugsa›u um júst hetta evni› - eru vit ein tjó› ella ikki. Eg fari tí her at endurgeva brot burtur úr tí, sum Petur Mohr Dam, forma›ur Javna›arfloksins og Torstein Petersen, forma›ur Fólkafloksins søgdu undir vi›ger›ini av Heimast‡rislógini, sum nú til okkara stóru undran er komin aftur til hei›urs og æru.

P. M. Dam: "Jeg ved, at det vil glæde færingerne at høre, at man i Danmark med så stor styrke, som den højtærede Statsminister gjorde det, anerkender færingerne som et særlig folk med den for et folk, en nation selvfølgelige selvbestemmelsesret.

Også den sidst tilbagetrådte højtærede Statsminister gav utvetydigt udtryk for, at danskerne og færingerne var nationalt ligestillede og skulle forhandle på ligefod, således at det skulle stå parterne frit, hvilken fremtidig ordning man ville gå ind for - herunder også muligheden for en fuldstændig adskillelse."

Torstein Petersen: " Den færøske nation er igen kommet til en milepæl. Det ligger sådan, at igen denne gang er det ikke på et færøsk Folketing, men på et dansk Folketing, at den lille færøske nations skæbne skal afgøres i øjeblikket, og det er derfor, jeg kommer med en appel til det høje ting om at tage dette spørgsmål under så alvorlig overvejelse som overhovedet muligt, tage det under reel behandling fra første færd og bygge på det, som færingerne ønsker, tænke på det, vi ønsker, og som sidstærede taler (P.M.Dam) nævnte, nemlig at blive anerkendt fuldt ud som den sjette nordiske nation."

Kanska kann hetta ver›a okkum ein lærа um hugbur›, tá samrá›ast skal um framtí›arstø›u Føroya.

Men serliga ein lærа fyri teir, sum sita hinumegin bor›i›.

Tí›indaskriv

LISA ví›kar um virksemi›

Listafólkasamband Føroya – LISA – hevur nú skrivstovu í Skansastovu í Djóna í Geilsgøtu 1.

Loksins hevur LISA møguleika fyri at veita limum, myndugleikum og sjálvandi eisini ø›rum ta tænastu, vit leingi hava ynskt okkum. Ætlanin er at skrivstovan hjá LISA skal virka sum ein samskiftismi›stø› fyri listafólkafeløgini. Harumframt hava vit eisini møguleika fyri at savna tilfar og uppl‡singar á einum sta›, solei›is at ta› ber til at venda sær til LISA fyri at frætta nærri um, hvat i› fyriferst á listafólkaøkinum.

LISA er eisini á netinum og á heimasí›uni, sum enn er í ger›, er ætlanin at leggja tilfar út, sum hevur almennan áhuga. Heimasí›an hevur hesa adressuna: www.lisa.fo og teldupostadressan er henda lisa@lisa.fo

Skrivstovan er opin, solei›is at støkkast kann inn á gólvi› hvønn hósdag frá kl. 14.000 til 20.00. Annars er altí› til at koma í samband vi› LISA um telefonijna og avtala a›ra tí›.

LISA er meginfelagi› hjá listafólkafeløgunum í Føroyum og skrivarin hevur ta› dagliga virksemi› hjá LISA um hond. LISA fær stu›ul frá Undirvísingar- og Mentamálast‡rinum til skrivaran.

Vinnumálast‡ri› roynir at skerja rættindini hjá fakfeløgunum

Vinnumálast‡ri› roynir vi› n‡ggja uppskoti sínum til lóg um seming í sambandi vi› arbei›sósemjur at skerja rættindini hjá fakfeløgunum og enntá ógilda lógirnar hjá fakfeløgunum.

Arne Poulsen, a›alstjóri í Vinnumálast‡rinum hevur sent fakfeløgunum og ø›rum feløgum uppskot til løgtingslóg um seming í arbei›sósemjun.

Hetta lógaruppskot er ein beinlei›is royndt at skerja aldagomlu rættindini hjá løntakarum at seta í verk arbei›sste›g, umframt at Vinnumálast‡ri› tekur sær rættindi sum uttan iva eru í strí› vi› grundlógina, tá st‡ri› í uppskoti sínum leggur upp til, at partar av lógunum hjá fakfeløgunum skulu fara úr gildi í sambandi vi› møguliga innanh‡sis atkvø›ugrei›slu.

Ta› er ein beinlei›is há›an móti fakfel-øgunum, at Vinnumálast‡ri› í vi›merkingum sínum sigur, at meginreglan eru tær somu sum í galdandi lóg, tí hetta er beinlei›is í strí› vi› veruleikan.

Her er talan um skipa›an ágang móti fakfeløgunum, at eg vóni, at fakfelagsrørslan stendur saman um at vísa aftur hesum lógaruppskoti.

Semingsstovnurin skal eftir uppskotinum hava óavmarka›ar heimildir at útseta arbei›sste›g.

Vert er at bíta merki í, at sambært uppskotinum frá Vinnumálast‡rinum, so skulu reglurnar í n‡ggju lógini vera solei›is, at semingsma›urin kann útseta møguligan arbei›sste›g í 2 vikur í mun til núgaldandi skipan, har semingsma›urin sí›ani galdandi lóg kom í gildi, bert hevur kunna› útsett møguligan arbei›sste›g, nevniliga í grein 5 stk. 5, grein 6 stk. 4 og grein 6 stk. 5.

Her er talan um ásetingar, sum í veruleikanum fara at gera ta› ógjørligt hjá fakfeløgum at seta í verk arbei›sste›g, tí semingsma›urin kann nú brúka allar tríggjar ásetingarnar í lógini til at útseta arbei›sste›gin.

Her er talan um munandi ví›ka›ar heimildir í mun til galdandi lóg, og endamáli› er uttan iva eittans, nevniliga at skerja fakfeløgini í teirra strí›i fyri at bøta um lønar- og arbei›skorini hjá limum felagsins.

Ta› er nógv fyri at síggja, at Vinnumálast‡ri› í vi›merkingum sínum til grein 6 sigur, at endamáli› vi› ásetingunum er, at »geva pørtunum meira tí› til samrá›ingar«, tá ta› er ey›sæ», at veruliga ætlanin er at skerja rættindini hjá fakfeløgunum.

Semingsma›urin kann útseta arbei›sste›g uttan tí›aravmarking.

Ikki bert mælir Vinnumálast‡ri› til at semingsma›urin nú í fleiri førum skal kunna útseta møguligan arbei›sste›g, men í uppskotinum til or›ing av grein 6 stk. 4 vil Vinnumálast‡ri› í veruleikanum geva semingsmanninum heimild til at útseta møguligan arbei›sste›g uttan nakra tí›armarking yvirhøvur.

Í nevnda uppskoti ver›ur ásett, at semingsma›urin ásetur – eftir at hava rá›ført seg vi› partarnar – freistina fyri, nær partarnir skulu hava svara› einum semingsuppskoti.

Sí›ani heldur Vinnumálast‡ri› áfram:

»Í hesum sambandinum kann semingsma›urin avgera, at frábo›a›ur arbei›sste›gur í fyrsta lagi kann setast í verk 3. dagin eftir, at partarnir hava svara›«.

Hetta merkir, at semingsma›urin t.d. kann seta freistina hjá pørtunum at svara til ein ella tveir mána›ar, ja, kanska 6 mána›ar og sambært lógaruppskotinum skulu partarnir ikki fyrr enn 3. dagin eftir at partarnir hava svara›, hava heimild at seta í verk l‡stan arbei›sste›g. Ta› er ikki ilt at ímynda sær, at arbei›sgevaraparturin sjálvsagt ikki fer at svara fyrr enn freistin er vi› at vera úti, t.d. 1, 2 ella møguliga 6 mána›ir eftir, at semingsuppskot er lagt fram.

Eftir lógaruppskotinum er ta› fullkomuliga upp til semingsmennirnar, at avgera um nakar møguligur arbei›sste›gur skal setast í verk ella ikki, og tí er ta› beinlei›is ósatt, tá Vinnumálast‡ri› í vi›merkingum sínum m.a. sigur, at »partarnir hava rætt at seta í verk tiltøk, verfall ella varkbann, um eingin sáttmáli fæst, sum partarnir kunnu gó›taka«.

Her er antin talan um óhoyrt lógarsjusk ella eina beinlei›is royndt at avtaka allan rætt hjá fakfeløgum at seta í verk arbei›sste›g ella onnur tiltøk.

Skal Vinnumálast‡ri› vi› lóg kunna seta úr gildi lógligar samtykta rlógir hjá fakfeløgum.

Ikki bert leggur Vinnumálast‡ri› seg út í heilt grundleggjandi rættindi hjá fakfeløgum, men so ótrúligt ta› kann ljó›a, so hevur vinnumálast‡ri› eisini ætlanir um at seta úr gildi ávísar reglur í lógunum hjá fakfeløgunum.

Í grein 8 stk. 3, 2. pkt. ver›ur ásett:

»Ásetingar í vi›tøkum v.m. um, hvussu einstaku limirnir á málførum fundi skulu grei›a atkvø›u, hava ikki gildi«.

Hetta merkir, at tá talan er um møguligar atkvø›ur bæ›i um vanligt semingsuppskot og tá talan er um uratkvø›u, so vil Vinnumálast‡ri› vi› lóggávu áseta, at í slíkum førum fara reglurnar um, hvussu limirnir í fakfeløgunum skulu atkvø›a úr gildi.

Vit skulu her hava í huga, at talan er um beinlei›is uppílegging í lógir, sum limirnir í fakfeløgum á a›alfundi hava samtykt.

Hetta uppskot avdúkar enn einafer›, hvussu lítla vir›ing sitandi samgonga hevur fyri vanliga borgaranum og serliga fakfelagsrørsluni, tí neyvan vildi nakar politikari sum hevur vir›ing fyri demokratii› okkara ditta sær at sett fram slíkt lógaruppskot.

Endamál landsst‡risins

Ta› er vert at bíta merki í at a›alstjórin sum hevur sent út nevndarlógaruppskot er fyrrverandi skrivari í Føroya Arbei›sgevarafelag, har hann í áravís var heitur talsma›ur fyri bæ›i arbei›srætti og høvu›savtalu.

Av tí at fakfeløgini stó›u saman eydna›ist ta› hvørki privata arbei›sgevarafelagnum ella almenna arbei›sgevaranum at fáa inn á føroyska arbei›smarkna›in høvu›savtalur og arbei›srætt.

Ta› er ey›sæ›, at ta› sum Vinnumálast‡ri› nú roynir er í veruleikanum at føra inn á føroyska arbei›smarkna›in reglur, sum vit annars bert kenna frá júst høvu›savtalum og lóggávu um arbei›srætt.

Eitt av høvu›sey›kennunum í høvu›savtalu er jú, at partarnir á arbei›smarkna›inum bert vi› langum tí›arfreistum kunnu bo›a frá ætla›um tiltøkum, men vi› lógaruppskoti sínum fer Vinnumálast‡ri› nógv longur, tí í veruleikanum vil hetta uppskot avtaka verkfalsrættin hjá fakfeløgunum.

Eg fari tí sta›iliga at heita á øll fakfeløg í Føroyum um har›liga at mótmæla nevnda lógaruppskoti og strí›ast fyri, at føroyska fakfelagsrørslan kann var›veita tey rættindi sum eru grundarlagi› undir teimum alsamt broyttu lønar- og arbei›skorum, sum feløgini hava strevast fyri at tryggja limum sínum.

Tórshavn, hin 01. desember 2000

Stjórnin í Føroya Arbei›arafelag
Ingeborg Vinther, Elias Hansen, Georg F. Hansen, Kári Jacobsen, Margretha Rasmussen, Marius Clementsen, Laila Zachariasen

TIT SPYRJA VIT SVARA

Bergur Hansen, djóralækni

Heri Joensen, prestur

Heri Krageesteen, sálarfrø›ingur

Ingi Højgaard, løgfrø›ingur

Jens Andreassen, lækni

Jóhanna á Tjaldrafløtti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur

Jón Klein Olsen, politistur

Jón Krageesteen. Fer›slutrygd

Julianna Næs, pedagogur

Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi

Turid Thomsen, lestrarveglei›ari

Marius Staksberg, málfrø›ingur

Málfrø›ingurin

Í 1998 gav Føroya Fró›skaparfelag út frálíku Mó›urmálsor›abókina, sum er eitt ógvuliga hent ambo› hjá skrivandi fólki og føroyingum annars.

Bókin er sí›ani vor›in teldutøk, og av tí sama er ta› vor›i› lætt hjá fólki at sláa upp or› vi› telduni í eini handavend, me›an tey sita og skriva. Or›abókin er tó bert teldutøk til PC-teldur, i› koyra vi› st‡riskipanini Windows.

Eg sjálvur skrivi nógv í mínum dagliga yrki og brúki MAC-teldu vi› st‡riskipanini MAC OS. Til hesa skipan kann or›abókin ikki n‡tast. Avlei›ingin av hesum er, at eg ofta lati vera vi› at sláa or› upp, tí ta› tekur ov drúgva tí› at sláa smálutir upp í pappírsútgávuni.

Havandi í huga, at øll blø›, flestu l‡singarstovur og bókaprentsmi›jur n‡ta MAC-skipanina, kundi eg hugsa› mær at spurt málfrø›ingin, um ta› ikki hev›i veri› eitt hugskot, um Fró›skaparfelagi› eisini gjørdi frálíku or›abókina teldutøka til MAC-brúkarar.

Grundin til at Føroysk or›abók ella Mó›urmálsor›abókin bert er gjørd teldutøk til Windows man vera, at Fró›skaparfelagi› ikki hevur hildi› ta› loysa seg at gera hana tøka til a›rar skipanir, tí nærum øll brúka Windows. Men ta› eru kortini fleiri, i› brúka MAC-skipanir, og ikki minst, sum nevnt í spurninginum, innan yrki, har or›abøkur ver›a brúktar dagliga, og av og á spyrja fólk eisini, um or›abókin er tøk til MAC. Og sjálvandi hevur ta› stóran t‡dning, at ta› er høgligt hjá fjølmi›lafólki at brúka eina mó›urmálsor›abók.

Ta› er eitt sera gott hugskot at gera Mó›urmálsor›abókina tøka hjá teimum, sum brúka MAC. Ta› er sjálvandi ein tekniskur og kanska eisini ein peningaligur spurningur, men vónandi heldur Fró›skaparfelagi› eisini hugskoti› vera gott. (Áheitan er send nevndini í felagnum.)

Løgreglan

Ymsasta›ni síggjast skelti, i› vísa, at parkeringsforbo› er. Ta› s‡nist, at summi ikki vir›a hesi skelti - t.d í Kinabrekkuni og vi› Velbasta›vegin, i› sum kunnugt er Ringvegur. Har standa so at siga altí› bilar parkera›ir - sum oftast teir somu. Hetta er til stóran ampa fyri fer›sluna, tí at har sum teir standa er bara eitt, kanska hálvtanna› vegspor tøkt til fer›slu, og so leingi ta› er talan um persónbilar sum møtast, ja so gongur ta› at møtast, men møtir man einum bussi ella lastbili, ja so má annar ste›ga fyri at lova hinum framvi›. Hetta er sera óheppi› - serliga, tá i› man hugsar um at talan er um høvu›svegir, har fer›slan annars skuldi gingi› væl!

Mín spurningur er: Hví ger løgreglan onki vi› hesar bilar/førara, tit vita óiva› um trupulleikan. Hev›i ta› ikki veri› uppá sitt pláss, at hesir fingu parkeringsbót fyri at standa parkera›ir har, sum bert loyvt er at ste›ga í 3 min.

Vit hava eina effektiva fer›slupatrulju, i› m.a. hevur eftirlit vi› ólógliga parkera›um bilum. Fer›slupatruljan er vi› jøvnum millumbilum á umrødda sta›i og gevur teim bilum, sum standa har parkeringsavgjald. Tí er ta› er ikki heilt beint, sum spyrjarin førir fram, at politii› einki ger. Um vit gera nóg miki› er altí› ein meting, tí onnur økir innan fer›sluna skulu eisini røkjast.

Fer›slutrygd

Nú eru rundkoyringar so n‡ggjar í Føroyum. Tá i› eg komi av bygd til Havnar, eri eg heilt í villarei›i, tá i› eg skal inn í royndkoyringarnar, tí eg veit ikki, hvørjar reglurnar eru.

At ta› koma fleiri og fleiri rundkoyringar, eiga vit at fegnast um. Øll hagtøl vísa, at har, sum rundkoyringar ver›a gjørdar, fækkast óhappini í stórum. Høvu›sorsøkin er uttan iva, at rundkoyringarnar gera, at fer›in á bilunum ver›ur sett ni›ur. Vi› lítlari fer›ber sum oftast til at ste›ga, á›renn óhappi› hendir, og í teimum førum, har illa vil til, og bilar t.d. stoyta saman, ja so er aloftast bara talan um materiellan ska›a. Umframt at fáa fer›ina ni›ur, gera rundkoyringar eisini fer›sluumhvørvi› einfaldari. Í vanligum vegakrossi skalt tú hugsa um bilar, sum koma frá vinstru og høgru - og kanska a›rasta›ni vi›. Í rundkoyring, hinvegin, skalt tú einans hugsa um bilar, sum koma frá einari sí›u, nevniliga vinstru sí›u.

Reglurnar fyri koyring í rundkoyring eru einfaldar: Tá i› tú skalt inn í rundkoyringina, hevur tú "hávatenn" fyri tær. Ta› merkir sjálvsagt, at tú skalt halda aftur fyri teimum bilum, sum eru í rundkoyringini. Tær n‡tist tó ikki at bí›a at fara inn í rundkoyringina tá eingin annar bilur er í henni. Tá i› tú metir, at tú nært at "flætta" teg inn í millum tveir bilar, uttan at teir noy›ast at bremsa upp fyri tær, kanst tú koyra inn. Komin inn í rundkoyringina, er bara at koyra, bilarnir, sum ætla sær inn í rundkoyringina, hava víkiskyldu fyri tær. Tá i› tú skalt úr aftur rundkoyringini, skalt tú bara minnast til at blunka til høgru, eitt sindur á›renn tú skalt snei›a út. So hóast tú kemur av bygd til Havnar, skalt tú ikki óttast rundkoyringarnar, tær eru nevniliga "brúkaravinarligar".

Læknin

Tey seinnu árini eru børn farin at drekka sera nógv sodavatn. Hvat árin kann ta› fáa á tey, um tey drekka ov nógv sodavatn?

Kjarnan í svarinum til hendan spurningin er hormoni› insulin. Vanligt sodavatn inniheldur nógv sukur, ja, ein plagar at siga, at okkurt um 16 sukurmolar eru í einari 25 centilituru fløsku. Sukuri› ver›ur í tarminum tiki› inn í blø›rensli›, og sukurkoncentrationin, eisini kalla› blø›sukuri›, hækkar. Hetta stimulerar aftur búksp‡ttkertilin (brisi› ella pancreas) at producera insulin, sum ver›ur sent inn í blø›rensli›, har ta› fer›ast runt í kroppinum og ávirkar nógv ymisk organ og ymsar processir – summar ver›a tarna›ar og a›rar stimulera›ar. Eg skal bert nevna tær, sum hava relevans í hesum høpinum.

Ein av høvu›suppgávunum hjá insulini er at fáa blø›sukuri› ni›ur og sí›ani at halda hetta innan eitt neyvt øki (3,5 < BS < 7 mmol/l). Ta› fær sukuri› burtur frá blø›renslinum vi› at flyta ta› inn í kyknurnar, har ta› antin ver›ur brúkt beinanvegin sum orka til kyknustoffskifti› ella ta› ver›ur bygt inn í depotir í livrini og vøddunum sum glycogen ella brúkt sum rámateriali til proteinsyntesuna (eggjahvítaevni). Tá hesar funktiónirnar eru metta›ar, finnur likami› ikki uppá at blaka yvirskoti› av sukurinum burtur, men ger sukuri› um til feitt, sum per volumen inniheldur meiri orku enn bæ›i kolhydrat og protein. So, drekka børnini nógv sodavatn, fitna tey, tá orkuinntøkan er størri enn orkun‡tslan.

Sosialrá›gevin

Ber til hjá einsamøllum uppihaldara at fáa fíggjarligan stu›ul tá á stendur, um inntøkan er umlei› 215.000 kr um ári›? Um so er, hvar skalt tú venda tær?

Vísandi til inntøkuna hjá spyrjaranum, tori eg at siga, at møguleikin fyri fíggjarligum stu›li er nærum ongin. Tó kann sigast, at møguleiki kann ver›a fyri at fáa hjálp til stakútrei›slur, men ver›ur hetta gjørt útfrá eini heildarmetting av stø›uni. Spyrjarin kann venda sær til økisdeildina hjá Almannastovuni har vi›komandi b‡r.

Er fíggjarstø›an serliga trupul, og hetta gongur út yvir trivna›in hjá børnunum, er møguleiki fyri, at venda sær til barnaverndarnevndina á sta›num, sum sí›ani sambært § 22 í barnaforsorgarlógini kann mæla Almannastovuni til at veita stu›ul.

Prestur

Mær dámar væl at ganga í kirkju, men eg haldi prædikurnar mangan eru ov ke›iligar og snúgva seg bara um júst ta›, sum stendur í Bíbliuni. Áttu prestar ikki at tosa› meira út frá dagsins samfelag og so heldur brúkt samanberingar ella myndir úr Bíbliuni?

Bíblian og ta›, sum har stendur, er Gu›s or›, sum vit skulu hava størstu vir›ing fyri og vi›fara sum slíkt. Tí skulu vit vi› Gu›s hjálp fyrireika okkara prædiku væl og vir›iliga, og haraftur at n‡ta ein livandi og vakran málbur›.

Prædikan skal helst vera aktuel og vi›komandi. Jesus tók dømi úr gerandislívinum á sta›num, har hann prædika›i/lærdi. Hann tók dømi um markirnar, fiskivei›ina, peningavi›urskifti og órættindi. Alt hetta høvdu áhoyrararnir sæ› og uppliva›.

Vit sum prædika eiga eisini at gera prædikuna vi›komandi. Vit eiga at byggja brúgv yvir tey tveytúsund árini, sum liggja millum okkum og prædikutekstin. Vit eiga stutt sagt at gera eina roynd at tulka tekstin inn í okkara samtí›.

Onkur hevur sagt hetta solei›is: Hav Bíbliuna í a›rari hondini, n‡ggjasta vikubla›i› í hinari og minst til at siga Amen. Av pedagogiskum orsøkum eigur prædikan heldur ikki at vera ov long. Royna vit at vera aktuel - ta› var Jesus eisini, so lurta fólk. Og dømi úr okkara gerandislívi kunnu kasta ljós yvir ta›, sum Bíblian hevur at siga okkum.

Lestrarveglei›arin

Vi›v. S.I.T. Hvørjar møguleikar hevur man til ví›ari læru/lestur um man gongur 1 ár á el-deildini á S.I.T.?

SIT merkir Stø›isútbúgving innan tøkni og er b‡tt sundur í fyrru og seinnu stø›iseind, sum tilsamans taka eitt ár. Í Klaksvík ber til at velja millum tvær linjur í seinnu stø›iseind: tøknilinjuna og HT-linjuna. Tøknilinjan er fyri tey, sum ætla sær undir eina handverks- ella atstø›isútbúgving, me›an HT-linjan er fyri tey, sum ætla sær á HT.

Aftaná SIT - t.v.s. bæ›i á el-deildini og hinum deildunum - hevur tú tríggjar møguleikar:

1. Tú kanst fara í læru sum handverkari og fáa gó›skriva› ein part av skúlatí›ini, av tí at tú hevur SIT frammanundan.

2. Tú kanst fara undir atstø›isútbúgvingina (teknikara), sum tekur 1 1/2 ár.

3. Tú kanst halda fram á HT-útbúgvingini, sum so tekur 2 ár aftaraat.

Allir tríggir vegir aftaná SIT - handverkslæra, atstø›isútbúgving og HT - geva so aftur n‡ggjar møguleikar fyri ví›ari læru og lesturi. Í faldaranum Mi›námsútbúgvingar frá Undirvísingar- og Mentamálast‡rinum ber til at lesa meira um SIT og møguleikarnar aftaná. Faldarin fæst vi› at ringja tlf. 355050 ella vi› at senda teldupost til umms@umms.fo

Spurnarkassin - tit spyrja vit svara

Hvønn mikudag í Sosialinum Spurningar kunnu senda til:

Sosialin
postsmogu 76
110 Tórshavn
fax. 314720
ella teldupost: spyr@sosialurin.fo

Minnist til at merkja, hvørjum tit seta spurningin.